**Bárður Kass Nielsen**
**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 63/2015: Uppskot til samtyktar um at dagføra og endurskoða løgtingslógina um dagstovnar og dagrøkt**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at dagføra og endurskoða løgtingslógina um dagstovnar og dagrøkt soleiðis, at kommunur kunnu veita peningaligt ískoyti til foreldur, sum ynskja at ansa børnum sínum heima.

**Viðmerkingar**
**Ansing av egnum børnum**
Demografisku avbjóðingarnar, sum eru fyri framman í Føroyum, krevja politisk átøk. Allir flokkar eru á einum máli um, at eitt av átøkunum fyri at rætta upp á skeiklaða aldursbýtið og skapa fólkavøkstur er at betra um umstøðurnar hjá smábarnafamiljum. Tilboðið "Ansing av egnum børnum" verður av undirritaðu mett at vera eitt beinrakið átak, sum fer at bøta munandi um trivnaðin hjá smábarnafamiljum, og stimbra undir tilflyting til Føroya.

Tilboðið gongur í stuttum út uppá, at foreldur kunnu móttaka kommunalt ískoyti fyri at vera heima og ansa sínum egnu børnum, í staðin fyri at bjóða teimum dagstovnatilboð. Tilboðið verður brúkt í ymiskum kommunum í Danmark, har ískoytið er uml. 5-7.000 kr. um mánaðin fyri børn millum 0-3 ár og uml. 3-4.000 kr. um mánaðin fyri børn millum 4-6 ár. Ískoytið kann veitast í upp til eitt ár.

Eitt slíkt tilboð fer uttan iva at vera kærkomið hjá nógvum smábarnafamiljum og gevur foreldrunum ein góðan og fleksiblan møguleika at tilrættisleggja gerandisdagin eftir egnum tørvi. Tilboðið fer eisini at gera tað, at trýstið á kommunalu ansingarstovnarnar minkar nakað, og at kommunur møguliga kunnu útseta nýbygging og útbygging av ansingarstovnum.

Fyri at kommunurnar kunnu veita hetta tilboð, krevst ein broyting í § 3 í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006. Greinin skal broytast soleiðis, at kommunur frameftir skulu hava møguleika at veita peningaligt ískoti til foreldur, sum ynskja at vera heima hjá børnunum. Undir verandi lóggávu, hava kommunurnar bara loyvi til at veita tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt.

Í Danmark bleiv hetta tilboðið til veruleika í 2002, og nógvar kommunur hava síðan tá valt at brúka hesa loysn, m.a. Odense kommuna. Í samrøðu við hesa kommunu kom fram, at tað eru serliga fólk, sum flyta til kommununa, ið velja at brúka skipanina, inntil tey hava fingið eitt fast ansingarpláss til barnið. Skipanin er sostatt ein ítøkilig hjálp í tíðarskeiðnum, tá familjur flyta. Tað eru í løtuni uml. 40-60 børn. ið verða ansað undir hesi skipan, í mun til tey uml. 8.500 ansingarplássini, sum kommunan hevur. Tað er tí ikki nógvar familjur, ið brúka hendan møguleikan í løtuni.

Tað eru ymiskar treytir, ið eiga at vera uppfyltar, fyri at foreldur kunnu fáa eina slíka umsókn góðtikna. Tann av foreldrunum, ið ynskir at vera heima hjá barninum/børnunum, kann ikki fáa forsorgarhjálp, lestrarstuðul ella hava nakra arbeiðsinntøku í tíðarskeiðnum. Tann av foreldrunum, sum brúkar hetta tilboðið, skal vera búsitandi í Føroyum í tíðarskeiðnum, har ískoytið verður útgoldið, og viðkomandi hevur rætt til ískoytið so skjótt, sum barnið kann setast á bíðilista til dagstovn. Afturat hesum eigur familjan at fáa vitjanir av einum heilsu-sjúkrarøktarfrøðingi ella øðrum fakpersóni í tíðarskeiðnum. Týttleikin og vavið av vitjanum kann ásetast í játtanini av umsóknini.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Tað eru ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið, av tí at hetta bert er ein lógarbroyting, sum gevur kommununum møguleika at veita hetta tilboðið til borgarar sínar. Tað er tó fult og heilt upp til kommunurnar, um tær velja at veita hetta tilboðið ella ikki, eins og tað er upp til kommunurnar, hvørjir ískoytissatsir skulu vera galdandi, og hvussu langt tíðarskeiðið skal vera.

**Sosialar avleiðingar:** Uppskotið hevur til endamáls at geva foreldrum møguleika at vera longur heima við børnunum, umframt at geva foreldrum ein meira fleksiblan møguleika at tilrættisleggja gerandisdagin á besta hátt fyri einstøku familjuna. Tilboðið fer eisini at koma væl við hjá familjum, ið velja at flyta til Føroya, men sum enn ikki hava fingið dagstovna-pláss til børnini.

**Á Løgtingi, 24. februar 2016**

Bárður Kass Nielsen | Kári P. Højgaard